

# RAÐHÚS Í HOYVÍK TIL SØLU

Um hóskandi boð fæst, verða raðhúsini Maritugøta 17 í Hoyvík, matr. nr. 1æq, seld. Húsini hava gott útsýni, og eru innrættað í tveimum hæddum á 58 fermetrar, ið gevur eina búvídd á íalt 116 fermetrar umframt úthús. Í niðaru hæddini eru gongd, wc/vaskirúm, køkur og stova í einum. Í ovaru hæddini eru trý kømur umframt eitt baðirúm. Eisini hava húsini eitt ovastaloft. Grundøkið er 136 fermetrar til støddar.

Nærri fæst at vita um ognina við at venda sær til.

Jens Andrias Vinther, advokat

HANSEN § THOMASSEN
ADVOKATFIRMA

Bryggjubakki 22 · Postsmoga 106 · 110 Tórshavn
tel: (+) 298 359595 · fax: (+) 298 359596
advokat@advokat.fo · www.advokat.fo

**Annfinn V. Hansen, adv. (H)**
annfinn@advokat.fo

**Djóni Thomassen, adv. LL.M.**
djoni@advokat.fo

**Rannvá Ragnarsdóttir, adv. mediator**
rannva@advokat.fo

**Jens Andrias Vinther, adv.**
jav@advokat.fo

# Lastbilur til sølu

BANK**NORDIK**

**Vegna eitt av viðskiftafólkum okkara selja vit ein lastbil við vippulast og krana.**

- **Toyota Dyna 200**
- **Árg. 09.02.2007**
- **Eginvekt 4250 kg**
- **Bilurin hevur koyrt 37.000 km**

**Áhugað kunnu venda sær til BankNordik á Tvøroyri, tel. 330 330.**

Sosialin
-so eru tit við!

# GÓÐ OG TRYGG ÍLØGA UPPÁ 8,73%

Talan er um eina áhugaverda íløgu við góðum møguleikum, har árliga avkastið er 8,73%.

Íløgan er ein íbúðarbygningur við 8 íbúðum, ið liggur væl fyri miðskeiðis í Havnini. Tað er samstundis ein bygningur, ið eisini kann geva eina góða privata íløgu.

**Áhugaði** eru vælkomin at venda sær til skrivstovuna fyri at fáa nærri at vita.

*Djóni Thomassen, advokatur*

**Advokatfirma**
**Hansen & Thomassen**
Bryggjubakki 22,
Postsmoga 106, 110 Tórshavn,
tele. (+) 298 359595,
fax. (+) 298 359596,
t-postur. advokat@advokat.fo

LISTASAVN FØROYA | P.O.BOX 1141 | FO110 TÓRSHAVN | TLF. +298 313579 | INFO@ART.FO | WWW.ART.FO



# Savnsleiðari
## til Listasavn Føroya

**Við hesum verður starv sum leiðari á Listasavni Føroya lýst leyst at søkja til setanar frá 1. mai 2011.**

Listasavn Føroya er tjóðlistasavn Føroya. Endamálið hjá Listasavninum er at savna, varðveita og miðla føroyska list. Framsýningar av føroyskari og útlendskari list skulu tryggja og miðla vitan um føroyska og útlendska list í Føroyum.

**Uppgávur**
Leiðarin á Listasavni Føroya kemur at hava listarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina og skal standa fyri menningini av Listasavninum sum tjóðlistasavn føroyinga.

**Høvuðsuppgávurnar hjá leiðaranum eru:**
- at hava dagliga raksturin av savninum um hendur, herundir at umsita savnið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál savnsins
- at gera framsýningarætlanir og aðrar virkisætlanir fyri savnið
- at virka fyri gransking og útvegan av tilfari um savnið og tey listaverk, ið savnið eigur
- at veita ráðgeving og virka fyri góðum samskifti og samstarvi við myndugleikar, listaøkið, søvn, stovnar, skúlar og almenningin yvirhøvur

**Faklig førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarar hava visjónir um at menna listaøkið í Føroyum og neyðugan førleika at leggja framtíðar ætlanir fyri Listasavn Føroya.

Umsøkjarar skulu hava listfrøðiliga ella aðra útbúgving, ella royndir ið kunnu metast at geva fakligan førleika at røkja starvið. Harumframt skulu umsøkjarar hava innlit í fíggjarviðurskifti og fyrisiting. Fyrimunur er at hava leiðsluroyndir, kunnleika til og royndir innan listasavnsøkið.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur, arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið er tíðaravmarkað í fimm ár við fyrsta árinum sum royndartíð og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Stýrið setir savnsleiðaran eftir tilmæli frá Listafelag Føroya og Felagnum Føroysk Myndlistafólk. Tann, ið verður settur, má góðtaka møguligar broytingar í setanar- og starvsviðurskiftum sínum í sambandi við bygnaðarbroytingar á savnsøkinum

**Fleiri upplýsingar**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Martin Næs, formann í stýrinum fyri Listasavn Føroya, tlf. 55 50 40 ella á martinn@mmr.fo, fyri at fáa meira at vita um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu sendast til:
Listasavn Føroya
Stílað Martini Næs, stýrisformanni
Postrúm 1141
FO 110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Listasavni Føroya í hendi í seinasta lagi 25. februar 2011, kl. 15

**Listasavn Føroya** varð skipað sum sjálvsognarstovnur í 1989 og verður rikið við rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini, egnum virksemi og við stuðli frá Tórshavnar kommunu og ymsum grunnum. Listasavnið virkar eftir viðtøkum fyri Listasavn Føroya frá 2002. Stýrið fyri Listasavn Føroya er ovasta leiðsla á savninum. Á Listasavni Føroya starvast 3 fólk í føstum starvi.